FYLGISKJAL 6.

LM-080/2023

heilsutrygd

Dagfesting: 30.01.2024

Tykkara mál nr.: 23/10433-6

Okkara mál nr.: 24/00051

Hoyringssvar til Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd

Heilsutrygd mælir til, Heilsumálaráðið ansar eftir orðaljóðinum í §24 Stk. 5. soleiðis, at heimildin er greið til at at gera reglur og mannagongdir fyri umsóknir og skjalprógv. Serliga hevur tað týdning, at tað ber til at seta krøv um skjalprógv, og at tað skal bera til at brúka Vangan – ella møguliga krevja, at umsøkjarar søkja talgilt við Vanganum.

Heilsutrygd kundi hugsað sær at sett upp skipanina soleiðis, umsókn verður send talgilt við at nýta Vangan.

Heilsutrygd mælir til, at mannagongdin, sum verður nýtt í.s.v. frítøku fyri heilsutrygdargjaldi verður umleið soleiðis:

1. Umsøkjari sendir umsókn um frítøku talgilt á Vanganum og, um hann hevur tað, sendir hann skjalprógv um heilsutrygdargjald í øðrum landi.
2. Heilsutrygd steðgar innkrevjing av heilsutrygdargjaldi, tá umsóknin er móttikin og góðkend.
3. Umsøkjarar skulu endurnýggja umsóknina um frítøku og senda skjalprógv fyri goldið heilsutrygdargjald í øðrum landi eina ferð um árið. Áminning verður send um freist at lata inn skjalprógv.
4. Heilsutrygd kannar skjalprógvini. Um umsøkjarin ikki hevur sent skjalprógv fyri goldið heilsutrygdargjald í øðrum landi, verður kravt eftir gjaldinum, sum tey áttu at hava goldið. Frítøkan verður steðgað, og borgarin verður kravdur eftir vanligum heilsutrygdargjaldi.

Postsmoga 52 / Klaksvíksvegur 7 / FO-710 Klaksvík / Tlf. +298 61 40 00 / T-post: heilsutrygd@heilsutrygd.fo